Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Jóhannis Joensen, løgtingsmaður

Svarari: Dennis Holm, landsstýrismaður í fiskivinnu- og samferðslumálum

Evni: Dalstunnilin og tunnilstoymið

Spurningar:

1. Hvussu gongur við arbeiðinum við Dalstunlinum?
2. Heldur tíðarætlanin?
3. Nær verður dalstunnilsprojektið við tilhoyrandi vegum liðugt?
4. Nær verður fyrsta skotið til tunnilin til Tjørnuvíkar skotið?

Viðmerkingar:

Dalstunnilin er sprongdur ígjøgnum og eftir er nú at gera projektið liðugt. Tunnilin skal tryggjast og asfalterast, og vegir við tunnilsmunnarnar skulu gerast lidnir. Pengar eru játtaðir til at enda projektið og tí er týdningarmikið, at arbeiðið gongur eftir ætlan. Eisini er ætlanin, at tunnilstoymið skal til Tjørnuvíkar, tá dalstunnilsprojektið er liðugt. Fyri at fáa at vita, hvussu arbeiðið hilnast, verða hesir spurningar settir landstýrismanninum.

Á Løgtingi, 4. mars 2024

Jóhannis Joensen